## Fyrrv. blaðstjóri til FSF

Ingi Samuelsen, sum í fleiri ár var blaðstjóri á Dimmalætting, er farin í starv hjá Fótbóltssambandi Føroya. Í morgun – mánadagin 5. november 2007 – byrjaði Ingi Samuelsen í starvi hjá Fótbóltssambandi Føroya. - Uppgávan hjá Inga Samuelsen verður í fyrsta lagi at taka sær av marknaðarføring og kunning av føroysku landsliðunum og føroyskum fótbólti sum heild. Eisini liggja ymsar aðrar uppgávur í starvinum, sum Ingi fer at røkja í tøttum samstarvi við Ísak Mikladal aðalskrivara og hini starvsfólkini á skrivstovuni hjá FSF, skrivar heimasíðan hjá FSF. Ingi Samuelsen er útbúgvin journalistur og hevur drúgvar royndir sum fjølmiðlamaður bæði í Føroyum og Danmark. Frá 1. januar 2002 til 31. mars 2007 var hann blaðstjóri á Dimmalætting.



## Armstrong bergtók

36 ára gamli Lance Armstrong, sum hevur gjørt seg kendan um allan heim við at vinna heili sjey Tour de France-súkklukappingar á rað, hevur ikki heilt slept ítróttinum. Hann gavst við súkkling á hægsta støði í 2005, men nú hevur hann fingið renniskógvarnar á beinini, og hevur í ár tikið lut í nøkrum marathon kring heimin. Hetta ger hann fyri at reklamera við sínari fyritøku, Livestrong, ið hjálpir børnum við krabbameini. Um vikuskiftið rann hann marathon í New York, og her kom hann á mál í sera góðari tíð. Við tíðini 2.46.43 rann Armstrong seg á mál sum nummar 214 av yvir 90.000 luttakarum. Hetta er bara smáar 24 minuttir aftanfyri vinnaran hjá kvinnunum, Paula Radcliffe.

## Fyrstu steypadystirnir

**Í Hondbóltssambandinum hava tey kastað lut um, hvussu spælast skal fyrstu umførini av Coca-Cola kappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Til fyrstu umførini eru liðini styrkismett, og tí er talan á pappírinum um avgreiðsluspurningar. Tað er tó sæð meira enn tí einu ferðina, at avgreiðsluspurningarnir kortini ikki eru so lættir av avgreiða, so tað kundi meira enn so hent seg, at onkur av favorittunum kiksar.

Hjá monnum skal fyrsta umfarið avgreiðast innan 16. november, og er talan tá bert um dystin millum Kyndil II og VÍF II. Innan 23. november skal næsta umfari spælast, og tá eru dystirnir hesir: 2 Team Klaksvik I -StÍF I, 3 Team Klaksvik-VÍF I, 4 Kyndil II/VÍF II-Neistin I, 5. Kyndil I, H71. Spurningurin um plássini í fjórðingsfinaluni saman við teimukm seks liðunum í Atlantic Airways kappingini skal so avgreiðast innan 1. desember. Tá spælarar vinnararnir av dysti 2 og 5 og vinnararnir av dystunum 4 og 3.

Hjá kvinnunum eru bara tveir dystir á skránni, áðrenn komið verður til fjórðingsfinalurnar. Hesir dystir eru Søljan-H71 og Neistin bI-Tjaldur. Í fjórðingsfinalunum koma liðini í Sunset-kappingini so eisini við í kappingina.

# Byrsur og peikandi bispar



*Finnbjørn fekk somu lagnu sum Eysturríki, eftir at Torkil fór at skjóta við skørpum*

**Skúlin við Ósánna var karmur um triðju Grand Prix kappingina í talvi, sum varð avgreidd leygardagin**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

Hetta var triðja av nýggju kappingum, har Grand Prix vinnarin verður funnin við at leggja seks tær bestu kappingarnar hjá tí einstaka saman.

### Haruskjóting ella telving

Tað verður sagt at vera óheppið, um gott veður hevur verið kvøldið fyri, tá farið verður at skjóta haru, tí hara er náttardjór. Men so var ikki við illverðinum fríggjakvøldið, har flestu harurnar óivað høvdu valt at bíða eftir betri líkindum, áðrenn tær komu fram. Hetta merkti eisini luttøkuna leygarmorgun, tí fleiri av telvarunum høvdu leitað sær niðan í hagan at møta svongu harunum í góðveðrinum.

Tó skal sigast, at luttakaratalið seinnu árini ikki hevur verið høgt í Klaksvík, so tjúgu telvarar má sigast at vera á góðari leið ein vakran leygarmorgun.

### Talvskrivarin ósigraður

Sigast man, at talvskrivarin hjá Sosialinum hevur havt eina dreyma byrjan upp á talvárið. Eitt sindur óheppið fyri hann sjálvan, tí tað er altíð ringt at skriva objektivt uttan at føla, at ein reypar um seg sjálvan. Tó kann ikki haldast áfram við at skáka sær undan, tí talvskrivarin vann øll talvini í triðju kappingini. Við hesum hevur hann tikið dik á seg á stigatalvuni og liggur 7,66 stig framman fyri argasta kappingarneytan.

### Finnbjørn dragnaði

Finnbjørn Vang hevur ligið á einum deildum 1. plássi eftir tvær tær fyrstu kappingarnar, men fekk somu lagnu, sum mongu harurnar hendan leygarmorgunin. Saman við Boga E. Hansen og Vagni Heldarskarð á sætta til áttanda plássi fekk hann bert 0,33 Grand Prix stig við heim í sjáttuni. Havast skal her í huga, at tríggjar tær ringastu kappingarnar verða drignar frá samlaðu støðuni, tá allar kappingarnar eru telvaðar, so roknast kann við, at hendan verður ein av teimum trimum hjá Finnbirni.

### Aðrir gera seg galdandi

Fyrrverandi føroyameistararnir Martin Poulsen og Torkil Nielsen endaðu javnir á øðrum plássi. Hetta er teirra fyrsta kapping, og tí kunnu teir eisini gera seg galdandi, tá samanum kemur, við at draga tríggjar kappingar frá, har tvær tær fyrstu, ið teir ikki luttóku í, eru íroknaðar. Krøvini eru tí, at teir luttaka í fimm av teimum seks komandi kappingunum, har teir kunnu heinta fleiri GP stig.

### Veteranur og unglingar fingu ratingvirðisløn

Kappingin var mannað við heili 11 unglingum. Av teimum fingu triggir ratingvirðisløn fyri gott avrik í mun til ratingtalið. Ungu talentini Rógvi Dragaberg, Rógvi E. Nielsen og Bogi E. Hansen fingu ratingvirðislønina saman við álopssinnaða veteraninum Vagni Heldarskarð, ið altíð er trúfastur til kappingar og eisini hevur sett síni merki í føroyska telving.

**Støðan í Grand Prix-kappingini**

| | |
|---|---|
| Ólavur Simonsen | 18,33 GP |
| Finnbjørn Vang | 11,66 GP |
| Herluf Hansen | 6,33 GP |
| Torkil Nielsen | 4,5 GP |
| Martin Poulsen | 4,5 GP |
| Jón Andreasen | 4 GP |
| Rógvi Dragaberg | 3 GP |
| Carl E. N. Samuelsen | 3 GP |
| Bogi Hansen | 2,83 GP |
| Vagn Heldarskarð | 2,83 GP |
| Rógvi E. Nielsen | 2,5 GP |
| Terji Petersen | 2 GP |
| Jaspur T. Gaard | 0,5 GP |